TILTØK

BRÚDLEYP

Leygardagin 3. juni kl. 14.00 giftast í Býráðshúsinum í Klaksvík, Heidi Neshamar, Tórshavn og Jógvan Kristin Olsen, Klaksvík. Dagurin verður hildin heima, Undir Grashjalla 9, Klaksvík, frá kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 26. juni kl. 13.00 giftast í Sjóvar kirkju, Kristina F. Højgaard Johansen av Strondum og Jóni Rasmussen av Skála. Døguriði verður fyri innboðin í Ítróttarhøllini á Skála kl. 17.00. Vælkomst verður eftir kl. 21.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Gudny Johannesen og Rodmund Magnussen á Signabø. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 14. juni á tlf. 421489, 421449 ella 421569.

Tann 29. juni giftast á Ráðhúsinum í Herning, Helma Jacobsen og Karl Dam Sinding. Í hesum sambandi hevði tað glett okkum at sæð familju og vinir til døguriða í Sinding Forsamlingshúsi friggjadagin tann 2. juli kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juni á tlf.0045 97136669.

Leygardagin 10. juli giftast Crista Sumberg Dahl og Bárður Mikkerlsen, bæði úr Vági. Vígslan verður í Bethel kl. 14.00. Vælkomst verður í VB-húsinum kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá inn 20. juni á tlf. 373877, 373827 ella 314447.

10. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Solina Joensen, Skopun og Hans Ib Jacobsen, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 255263 ella 320391 eftir kl. 19.00. Seinasta freist at tekna seg er 15. juni.

24. juli kl. 16.00 giftast Gitte Johannesen og Finnur Klein í Dómkirkjuni. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

SILVURBRÚDLEYP

23. juni hava Petra og Hans Jørgin Nysted í Hvannasundi verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsveitslan verður hildin á Notel Norð **26. juni kl. 19.00**. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 452105 áðrenn 14. juni.

GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 4. juli hava hjúnini Jóna og Hans Jacob Andreasen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin 3. juli kl. 16.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 455782 ella 456772 innan 21. juni.

80 ÁR

Mikudagin 16. juni verður Evald Norðberg, Hvalba 80 ár. Hann verður burturstaddur.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 15. juni, Runavík tlf. 44 70 10
Sunnudagin, 16. juni, Runavík tlf. 44 80 16

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

Gudstænastur 1. sunnudagur e. trinitatis
Havnar kirkja: kl. 11 Sonja Klein, altarg., skriftamál kl. 10.40
Vesturkirkjan: 11,
Kirkjubøur: kl. 12.15, Heri Joensen
Nólsoy: kl. 12,
kl. 15 Barna- og familjugudstænasta, Jóannis Fonsdal
Kvívík: kl. 12, Marjun Bæk og Hans Vium Mikkelsen
Sandavágur: kl. 11, David Johannesen
Miðvágur: kl. 11, Martin R. Jacobsen
Glyvrar: kl. 11, Meinhard Bjartalið
Sjóvar kirkja: kl. 11, altarg, Jógvan Friðriksson
Funningur: kl. 12, Emil Olsen, messa
Eldúvík: kl. 12, altarg.,Uni Næs
Skúvoy: kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
Bø: kl. 11 altarg., Inga Poulsen Dam
Christianskirkjan: kl. 11, E. Harbsmeier og N. P. Danielsen, altarg.
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10
Kunoy: kl. 12, altarg.,
Norðoyar røktarheim: kl. 14.30, Hans E. Hammer
Fámjin: kl. 11, Jónsvein Bech
Øravík: kl. 12
Vágur: kl. 11,
Porkeri: kl. 12.15, altarg., Patrick de Neergaard

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Leygardagin kl. 11 Útifundur – um viðrar.
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Familju-útferð – um viðrar. Viðrar ikki til útferð verður møti kl. 18, Siv og Eyðfinn Joensen tala og leiða. Øll eru vælkomin.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður Barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 eisini Møti, har Sverri Steintún talar. www.hebron.fo

Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Rúna Rasmussen, kl. 22 Útimøti á Vaglinum – um viðrar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Egil Joensen.

Samkoman Lívdin í Hoyvíkar skúla
(inngongdin er flutt til nýggjaskúla).
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti. Vitjan verður av fólki frá »Doulos« og »Anastasis«.
Sunnumorgunin á Familjumøtinum kl. 10.30 talar Jógvan Z. um evnið: Truplir spurningar úr Bibliuni »Hví líða rættvís menniskju?«
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 luttaka Danjal og Synnøva av Rana.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. www.livdin.fo

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 12. juni kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Filadelfia Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, ABC v/ Frank Jacobsen, evnið er: Fyrigeving við blóði Jesusar 2. partur, kl. 18 Møti. Mánadagin kl. 19.30 Bønarskúlin og breakthrough worship. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí frá kl. 8-16.

Frá Ebenezer
Sunnudag kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Eldra kvartettin úr Betesda syngur. Talarar Poul Færø og Eyðfinn Reyðberg.
www.ebenezer.fo

Samkoman Rhema
Sunnudagin Møti og Sunnudagsskúli kl. 11.
www.rhema.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa og barnadópur v/ Wladyslw Zdunek prest í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Kristian Davidsen, Barbara syngur.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Miðvágs Missiónshús
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Viðrar, verður skipa fyri útferð. Kl. 18 Møti. Hjartaliga vælkomin.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, Jón Miðberg talar. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Jon Eli Johannesen úr Havn.

Hvalvíkar Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Vík og Tjørnuvík
Heimamissiónin hevur útimøti leygarkvøldið kl. 19 í Vík og kl. 21 í Tjørnuvík.

Bygdarhúsið í Tjørnuvík
Sunnukvøldið kl. 19 Møti, Regin Høgnesen talar, tórhild og Inga syngja og spæla. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Hjalmar Hansen. Aftaná møti verður drekka. Innsamling til húsið. Øll eru vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.30 Praise expolsion á Eystanstevnu.
Sunnudagin kl. 17 Møti v/ monnum. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Aglow-møti
verður í Stranda Sentrum leygardagin tann 12. juni kl. 15. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Tabor, Toftir
Ungdómsmøti á Toftum er avlýst vegna eystanstevnuna. Víst verður á, at ungdómsmøti verður í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Thabor, Fuglafjørður
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, har Thaborkórið eisini syngur.

Fuglafjørður
Týsdagin kl. 15.30 í Fuglafirði altarg., Uni Næs. Gudstænastan er í samstarvi við Heimarøktina. Eftir gudstænastuna verður kaffi í konfirmantstovuni.

Útimøti í Runavík
Blái Krossur hevur útimøti við Sjómansheimið í Runavík leygarkvøldið kl. 19.45 v/ talu og felagssangi, eisini koma Petur Hans, Tummas og aðrir at syngja og spæla. Bjóðað verður kaffi og køkur.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Sælur er tann maður,ið troystar á Harran, og hvørs álit Harrin er, hann verður líkur træi, sum er gróðursett við vatn, og sum toyggir røtur sínar út í løkir og ikki óttast, um hitin kemur, hvørs leyv altíð er grønt, sum ongan vanda hevur í turrum árum og ongantíð lættir av at bera ávøkst« (Jeremia 17, v. 7-8).

Tað er eyðsýnt, at profeturin við hesi myndini av trænum og tess rótum hugsar um okkum menniskju, og hvønn týdning tað hevur fyri okkum, at vit eru rótfest – at vit eiga røtur, ið stinga djúpt, haðani vit altíð kunnu taka til okkara tað, sum okkum er tørvur á fyri at vera til. Og so er ikki so langt frá hesi mynd at tala um hitt fótfesta, guðsóttandi menniskja, hvørs røtur ikki bara eru knýttar at tí forgongiliga, tí komandi og farandi, men at sjálvum hinum livandi Guði – hann, sum altíð er mentur at halda okkum uppi við sínum lívgandi vatni – tí lívsins kelduvað, ið vara skal við til ævigt lív.

Nú kundi eisini verið stuttligt at sæð hesa myndina, soleiðis sum træið sær hana – sum Helder Camara, biskupur, hevur sagt, at »tá trøini síggja okkum menniskju, fáa tey samkenslu við okkum, tí teimum tykir synd í okkum. Tey halda, at vindurin man fara avstað við okkum, tí at vit menniskju hava jú ongar sjónligar røtur«.

Jú, sæð frá trøunum munnu vit menniskju tykjast vera sera óstøðugir skapningar, sum synd er í. Altíð í gongd og ávegis, har vit menniskju alla tíðina sjálvi mugu geva okkara lívi meining og innihald uttan at okkum av nátúruni var givið rótfesti og røtur sum øðrum skapningum. Ongar røtur tykjast halda okkum aftur, har vit kanska festu búgv langt heimani og við okkara lívsstarvi ikki komu at breðga ættini til.

Og kortini kenna vit øll til, hvussu gomul minnir heimani so mangan taka okkum av ræði. Tá vit eftir mong ár komu heimaftur at vitja, aftur gingu tað gomlu bygdargøtuna – aftur kendu somu ljóð, vælkend mál, og tevjaðu vælkendan royk, hóast so mangt vatnið var runnið síðani seinast. Man tað ikki vera tí, at vit menniskju eisini eiga røtur innan í okkum – at vit eru meiri rótfest enn vit mangan sjálvi vilja vera við, og at tað tí er av alstórum týdningi, at vit kenna hesar røtur – tí hvørji eru vit uttan tær?

Guð, gev okkum røtur, ið nema jarðarinnar dýpdir, so at vit botna eisini í farnum tíðum, rótfest í fedranna trúgv. Gev okkum megi at vaksa á tí stinna viðarbulinum, so vit styrkt kunnu verja borg og ikki vikast, tá ið ódnirnar herja. Veit okkum framtíð og lat bløðini grønkast av nýggjum og eftir vetur nýggjar vónir um lív og sælu, og tá heystið er komið, lat okkum bera frukt. Harri, sum eitt træ verði fyri tær mítt lív!

Martin Restorff Jacobsen

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja
CATERPILLAR
Entreprenørmaskinur við figging

Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · jan@alma.fo

Bilur til sølu
Rover 200 1.4 Si
Árg. mars 2000 · km. 42.000
Til sølu vegna flyting
Tel 328003 • 270609
ella +45 28922575

BÁTAR TIL SØLU

Cleopatra 9,5 m. Árgang 1999. Motorur: Cummins 254 hk. Báturin og motorurin eru høvuðsumvældir. Øll tól og el-útgerð eru nýggj.
Prísur: 14 mio íslendskar kr.

Cleopatra 9,5 m. Árgang 2000. Motorur: Iveco 400 hk. Netaspæl. Øll siglingartól. Báturin er sera væl útgjørdur.
Prísur: 23 mio íslendskar kr.
Nærri upplýsingar: Kvótamarknaðurin ehf. Tel +354 5334455 · Fax +354 5334456
GSM +354 8637313 · e-mail: kvotamarknaður@kvotamarknadur.is · www.kvotamarknaður. is

HESTPRENT

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 19 Møti við sangi og vitnimøti. Innsavnan í samband við toymisferðir til Kina/Ukraina, kl. 21 Ungdómsmøti.

Leirvík
Mikudagin 16. juni kl. 15.30 í Leirvík altarg., Uni Næs. Gudstænasta er í samstarvi við Heimarøktina. Eftir gudstænastuna verður kaffi í missiónshúsinum.

KFUM & K, Klaksvík
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Snorra Brend, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Sunnumorgun kl. 11 Møti við Eivinn Bringsberg.

Soli Deo Gloria
Leygardagin kl. 15 Bíbliutími, evnið: Okkultisma, kl. 23 Ungdómskvøld í Skálanum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ ungdómi úr Soli Deo Gloria.

Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og Lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Aglow, Sandoy
Aglow møti verður leygardagin kl. 20 í Samljóð við vitjan úr Havn, kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin. Samlað verður inn til Grønlandsferðina.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Útferð við Sunnudagsskúlanum verður sunnudagin kl. 14 frá Missiónshúsinum. Foreldur eru vælkomin at hjálpa til við koyring. kl. 18 Møti við Jeannu og Mouritz Viderø. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygardagin kl. 16 Útimøti uttanfyri Frelsunarherin. Møti fjølment!!!
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli – um viðrar fara vit útferð, kl. 18 Evangel. møti, Eddie Bech talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur – um viðrar. Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

Sion, Vágur
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Bygdarhúsið í Lopra
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Sumba
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Sigrid Ludvig og Denni Debes, Ebba og Nimrod syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-friggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bleðini eru til taks.
Mánadagur 7. juni
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin, tlf. 316491.
Tilhaldið á Sandi bjóðar okkum suður 28.-29. juni. Ymiskt verður á skránni, Bocciakapping. Kunningarstovan skipar fyri eini kvøldsetu í Dali. Tilmeld. 316491
Týsdagur 8. juni
kl. 10-11.30 Felagssangur við starvsfólkunum á býráðnum. Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15-17 Opið hús
Mikudagur 9. juni
kl. 10-12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll hjartaliga vælkomin at vera við.
kl. 14-16 Undirvísing í Boccia í kjallaranum
kl. 15 Túrur
Hósdagur 10. juni
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
kl. 15 Tilhaldið Fløvin av Glyvrum vitjar
Friggjadagur 11. juni
kl. 10-17 **Opið hús**
kl. 15.30 **Vitja »Senior-blásarar frá Odense.** Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 13. juni verður gongutúrur úr Signabø-Kaldbak. Tungur túrur, gingið verður 3-4 tímar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 14. juni
Vit lurta eftir frásøgn hjá Jóhan Hendrik Hjalt. Hann sigur frá, um ein túr úr Liverpool til Føroyar. Sendingin hevur verið send í Útvarpi Føroya. Vit tosa um noregstúrin í summar.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Billettprísur: 70,- kr.
Leygardagin 12.06.kl. 16[30]
Leygardagin 12.06.kl. 19[45]
Leygardagin 12.06.kl. 23[00]
Sunnudagin 13.06.kl. 16[00]
Sunnudagin 13.06.kl. 19[15]
Sunnudagin 13.06.kl. 22[30]

Leygardagin 12.06.kl. 18[00]
Leygardagin 12.06.kl. 23[30]
Sunnudagin 13.06.kl. 21[30]

Leygardagin 12.06.kl. 20[45]
Sunnudagin 13.06.kl. 18[45]
KOMANDI FILMAR

Frumsýning fríggjadagin 18.06

Frumsýning fríggjadagin 18.06
Stórt úrval av DVD-filmum til sølu